# Bert nakrir tímar at seta heilar átta íbúðir upp á Boðaneshamri



**- Tað tók bert hálvan tíma í morgun at seta ta fyrstu íbúðina upp, og tá komið er út á seinnapartin, standa allar tær fyrstu átta íbúðirnar uppi, sigur Eyðfinn Lenvig, verkætlanarleiðari hjá J & K Petersen Íbúðir**

ÍBÚÐARBYGGING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin komu tær fyrstu átta íbúðirnar, sum P/F J & K Petersen Íbúðir skulu byggja á Boðaneshamri, til landið.

Tað er felagið Jytas í Århuus, sum byggir íbúðirnar í sektiónum, og tað eru eisini menn hjá hesum felag, sum longu í morgun hava sett tær fyrstu upp á hamrinum.

Samlaða verkætlanin hjá J & K Petersen Íbúðir snýr seg um tilsamans 32 í búðir, og næsta sendingin kemur heim til Føroya úr Danmark um hálvan apríl, triðja um hálvan mai, og síðan kemur seinasta sendingin um mánaðarskiftið mai/ juni.

### Gongur skjótt

Í síni tíð, tá Norðsetur byrjaði at smíða hús í Føroyum, undraðu mong seg yvir, hvussu skjótt tað kundi ganga at fáa eini heilt hús upp at standa. Tú fór frá húsum um morgunin, og tá tú komst aftur, stóðu eini nýggj hús uppi í grannalagnum.

Í hesum førinum gongur tað uppaftur skjótari – ja, nógv skjótari.

Hetta er samstundis fyrstu ferð, at slík íbúðarbygging fer fram í Føroyum.

Eyðfinn Lenvig, verkætlanarleiðari hjá P/F J & K Petersen Íbúðir, sigur, at tað tók bert hálvan tíma at seta ta fyrstu íbúðina upp í morgun, og tá ið komið er út á seinnapartin, standa allar tær fyrstu átta íbúðirnar uppi á Boðaneshamri.

Hetta ljóðar ótrúligt, men tey, ið ivast, kunnu fara sær ein túr Yvir við Strond og síggja, hvussu umhvørvið á Boðaneshamri umbroyttist eftir fáum tímum í dag.

Sektiónirnar hava staðið á bryggjuni í Havn síðan mánadagin, og hálv onnur sektion fer til hvørja íbúð.

Í morgun hivar ein krani hjá Júst Sivertsen sektiónirnar upp í trailarar hjá Iani Rasmussen, sum koyrir tær niðan á Boðaneshamar. Á hamrinum tekur ein stórur krani hjá KJ Smíð ímóti og hivar sektiónirnar upp á pláss á fundamentini, sum J & K Petersen hava stoypt.

Síðan taka seks mans ímóti og seta sektiónirnar saman, og eftir lítlari løtu standa nýggj og heil hús uppi, næstan klár at flyta inn í.

### Góð samanbinding

Eyðfinn Lenvig sigur, at allar instalatiónir liggja klárar til íbindingar, eitt nú rør, el, telefon og antennukaðlar.

- Sektiónirnar verða heftar saman við jarnbesløgum, síðan verða tær bóltaðar saman og krússfiner verður lagt uttaná saman komingarnar.

Spurdur, um konstruktiónin heldur til føroyska veðurlagið, heldur Eyðfinn, at eingin ivi er um tað.

- Felagið Jytas hevur nógv ár á baki í hesi vinnu og hevur stórt byggivirksemi.

Hann vísir á, at fleiri føroyingar arbeiða hjá hesum felag, sum heldur ikki er ókent í Føroyum og við føroysk viðurskifti og veðurlag.

- Jytas hevur áður bygt í Føroyum, og tað er so langt afturi sum í áttatiárunum.

Verkætlanarleiðarin vísir til stuttleikar á, at tær mongu íbúðirnar, sum Ritt Bjerregaard, yvirborgarstjóri, ætlar at byggja í Keypmannahavn, koma bíligar úr eystsurlondum, men eru bygdar í sektiónum eftir sama prinsippi, sum Jytas byggir sínar.

- Vit hava onga orsøk at ivast í, at íbúðirnar, sum Jytas letur okkum, ikki í allar mátar eru dygdargóðar íbúðir, leggur hann aftrat.

### Lyklaklár hús

Tær átta íbúðirnar, sum verða settar upp á Boðaneshamri í dag, eru tær niðastu í røðini á hamrinum.

- Nú hesar íbúðirnar eru komnar upp, eru tær samstundis næstan klárar innan eisini.

Tá ið vit tosaðu við Eyðfinn í morgun, segði hann seg ikki hava hugt so nágreiniliga inn í sektiónirnar, at sjálvur køkur er settur upp.

- Men køkurin er við, og hann er í sektiónunum. Hinvegin er alt baðirúmið klárt, og soleiðis standa wc-kumma, vask og baðirúmsmøblar uppi. Í prinsippinum kanst tú longu brúka wc'ið og vask, bara tú setir rørini, sum longu eru løgd, saman við rørunum, sum ganga úr wc-kummu og vaski, sigur hann.

Allar íbúðirnar verða latnar lyklaklárar, og fólk kunnu longu flyta inn í tær fyrstu 16 íbúðirnar í mai/ juni, og síðan verða tær seinastu 16 klárar at flyta inn í um hálvan juli.

- Einasta, sum eftir verður hjá fólki at skaffa sær, er innbúgv og gardinur, sum Eyðfinn tekur til.

Íbúðirnar á Boðaneshamri verða seldar við lidnum køki, baðirúmi, kombineraðari vaskimaskinu og turkitrumlu og sjónvarpi (flatskermi).

- Úthús, sum er 3,7 fermetrar stórt, verður eisini til hvørja íbúð, sigur hann.

Demick tekur sær av hita- og saniteti, HTH í Føroyum setir køkarnar upp, og Leif Mohr leverar allar hvítvørurnar.

El-arbeiði, sum skal gerast, tekur Torfinn Nielsen í




*Á Boðaneshamri tekur ein stórur krani hjá KJ Smíð ímóti og hivar sektiónirnar upp á pláss á fundamentini. Síðan taka seks mans ímóti og seta sektiónirnar saman, og eftir lítlari løtu standa nýggj og heil hús uppi, næstan klár at flyta inn í*
*Mynd: Jens Kr. Vang*